Hoyringssvar til uppskot dagfest 09.03.2023 um Veiðigjaldslóg

Vit hava hesar viðmerkingar, har tann fyrsta er tann týdningarmiklasta:

1. Tað er neyðugt við einum progressivum tilfeingisgjaldsskala ella einum botnfrádrátti har t.d. avgjald ikki verður goldið av teimum fyrstu 30-40 mió. krónurnar í landingarvirði pr. skip. Hetta hevur serliga stóran týdning fyri smáu kvotahavararnar tí fyrstu 30-40 mió. krónurnar fara til at dekka grundkostnaðir. Í 2022 rindaði okkara felag uml. 13 mió. kr. í tilfeingisgjaldi og rakstrarúrslitið var uml. 0 mió. kr. Hetta er ikki í tráð við tankan um at virkir skulu rinda ein part yvirnormala profittinum í tilfeingisgjaldi. Tað er soleiðis at smáur aktørarnir hava ongan yvirnormalan profit, og tískil fer næstan 100% av yvirskotinum til tilfeingisgjøld.

   Alivinnan rindar so gott sum einki um teir einki yvirskot hava pr. framleitt kilo; ímeðan uppsjóvarvinnan rindar frá fyrst fiskaða kilo. Her burdu báðar vinnur verið líkastillaðar.

2. Vit meta at í mesta lagi 20% av landingarvirðinum eigur at verða goldið í tilfeingisgjøldum. Tað eru sera stórir kostnaðir knýttir at hesi vinnu, og hædd verður ikki tikið fyri hesum. Manningarkostnaðurin liggur um 29% av landingarvirðinum eftir tilfeingisgjøld. Her er tað soleiðis at talan ikki er um fríðan samráðingarrætt, tí at tað er sett inn í lógina at skipið fær ikki fiskiloyvi útskrivað uttan váttan um avtalu við manningarfelag. Hetta merkir at manningarfeløgini kunnu nærum krevja tað teimum listir væl vitandi at skipið ikki fær fiskiloyvi fyrr enn ein avtala er gjørd. Oljukostnaðir og viðlíkahaldskostnaðir eru eisini sera stórir.

3. Vit halda tað ikki vera rætt bert at leggja høg avgjøld á bíligastu fiskasløgini ímeðan dýru fiskisløgini einki rinda. Her verður m.a. hugsað um skeljar (6.000 tons í 2022) og Havtasku/svartkalva (4.000 tons í 2022). Heldur hava eitt meira rímiligt tilfeingisgjaldgjald har fleiri luttaka.

Vinarliga

Jógvan Martin F. Joensen
P/F Jupiter